# Tá ið navnin bergtók Norðurlandahúsið

UMMÆLI

Konsert við Martin Joensen og hinum í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið 17/2-2007.

Meðan tey flestu gingu og lótu seg í til 'maskuspæl' fastalávintsleygarkvøld, høvdu *Martin Joensen og hinir* gjørt av at borðreiða við ektaðum Martin Joensen-tónleiki í Norðurlandahúsinum.

Eg fari ikki at ummæla tað tónlistarliga í hesum tiltaki, tað eri eg ikki førir fyri, men um løtuna sum heild kann eg siga, at hon var ótrúlig. Ein massivur pakki av tulkingum av yrkingum - eftir kanti, beint í høvdið. Hóast tú kendi allar yrkingarnar, áðrenn tú settist at lurta, so var tað sum um talan var um nýggja vøru, pakkaða inn í annað pappír. Og eg haldi, at tað hetta kvøldið eydnaðist bæði sangara og tónleikarum at gera, tað, sum teir eftir øllum at døma høvdu sett sær fyri, nevniliga, enn einaferð, at *geva* nakað frá sær. Konsertin byrjaði við, at Martin bjóðaði øllum at vera vælkomnum til eina konsert við framførslu av yrkingum, sum handlaði 'um teg og eitt sindur um meg', sum hann sjálvur tók til.

Tað er langt síðan, at tveir og ein hálvur tími hava gingið so skjótt. Skráin var kend frammanundan: Martin fór at syngja burtur úr tí, hann higartil hevur givið okkum av sínum sangskatti. Og tað er ikki smávegis. Vit hoyrdu m. a. yrkingar sum Ró, Morgun, Lat meg goyma teg, So ganga míni ár, Svarti ravnur, Á brúnni, Í gjár, Eingin er sum tú, Í Heygadali, Í tínum eygum, Um songartíð.



Langt er ímillum, at tú í Føroyum hoyrir so heilskaptar framførslur. Har vóru ikki bara *tekstir, tónar og tekningar*, sum tað stendur á bókakápuni á bókini, *Lat meg goyma teg,* sum Martin gav út fyrr í vetur, men nú var skráin víðkað við inniligum *tulkingum*, ið vístu, hvussu Martin heldur á at búnast sum listamaður. Haraftrat vóru tónleikararnir, ið skaptu heildina saman við Martini, framúr góðir, teir vóru: Eyðun Mohr Hansen, Jónleif Jensen, Pauli Magnussen, Jákup Zachariassen, Magnus Johannesen og Niels Olsen.

Ikki skerst burtur, at tað var tann álvarsami Martin Joensen, sum áhoyrararnir hoyrdu hetta kvøldið. Hann sang um *sorg* og *skuggar*, um *iva* og *longsul*, um *ljós* og *myrkur* um *túnatøgn,* og *mannatómar gøtur* og - *um timburmannin í Nasaret.* Hann tulkaði sínar yrkingar fyri opnari mikrofon, og hann gjørdi tað heilt einfalt so væl, at tað var ikki sørt, at gólvbrettini í Norðurlandahúsinum fóru upp at ristast og flagið á tekini hevði hug at lyfta sær uppfrá. Og eg má siga, at tá ið so dóttirin, Malan, kom á pallin og rætti pápanum eina hjálpandi hond við yrkingini *Í gjár*, tá var av sonnum vár í luftini.

At tað vóru vælnøgdir áhoyrarar, sum fóru av stað aftur úr Norðurlandahúsinum hetta kvøldið var síðsta løtan eitt gott dømi um. Klappini mundu ongan enda tikið, so at tú skuldi trúð, at tað veruliga hevði eydnast Martini at 'keypt Tofta bygd', soleiðis sum hann skemtiliga tekur til í yrkingini *pengar*, sum tó ikki var á skránni hetta kvøldið

Góði Martin og tónleikarar til lukku við tiltakinum - túsund takk fyri eitt minniligt kvøld fyri tekstir, tónar, tekningar og tulkingar. Eg havi hug at enda við tínum egnu orðum:

*eingin er sum tú.*

***Navnin í Skørugøtu***

# Ætla at keypa Skeiva Pakkhús fyri 12,5 mió kr

**Tórshavnar býráð fer á býráðsfundinum í morgin at taka støðu til, um býráðið skal keypa Skeiva Pakkhús frá P/F Valdemar Lützen fyri 12,5 milliónir krónur. Borgarstjórin mælir til at keypa, andstøðan mælir ímóti, meðan tjóðveldisumboðini taka støðu á fundinum**

SKEIVA PAKKHÚS

*Eirikur Lindensikov*
eirikur@sosialurin.fo

Býarskipanin hjá kommununi hevur ímyndað sær økið úr Lágabø heim móti Rættará og Skálatrøð í Havn sum savnsøkið, har Westward Ho, Norðlýsið og aðrir søguligir bátar og skip liggja.

Økið fevnir um Müllers Pakkhúsi, Fabrikkina, neystið við Lágukai, Skeiva Pakkhús og Gamla Hospital.

Fyri ferðavinnuna, handilslívið, mentanarlívið, savnsvirksemið, ráðstevnur, oljuvinnuna o. a. virksemið hevur tað stóran týdning, at kommunan er aktivur partur í arbeiðinum at skapa góðar karmar sum mentanarbýur, verður sagt í tilmælinum.

Kommunnustjórin, Jens Marius Poulsen og trivnaðarstjórin, Ingibjørg Berg, mæla til at kommunan ognar sær Skeiva Pakkhús.

Sagt verður í tilmælinum, at ilt er at kapitalisera virðið, ið liggur í økinum og teimum karmum, sum økið longu nú hevur.

Heine Lützen boðar vegna seljararnar frá, at teir eru sinnaðir at selja kommununi Skeiva Pakkhús fyri kr. 12.500.000, um skjótt verður gjørt av.

- Grundað á hetta verður mælt til, at kommunan keypir Skeiva Pakkhús, stendur í tilmælinum.

Fíggjarnevndin hevði fund um málið fríggjadagin: Heðin Mortensen mælir til, at kommunan ognar sær bygningin.

Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen mæla frá, at kommunan keypir ognina.

Jógvan Arge og Leivur Hansen taka støðu á býráðsfundinum.



*Skeiva Pakkhús - pakkhúsið í miðuni - er til sølu. Tað er P/F Valdemar Lützen, sum eigur húsið, men Tórshavnar Býráðið hevur tað í boðið fyri 12,5 milliónir krónur*